# Kjak



Heri Mohr

## Psykiatrisk hjálp

Sjónvarpið hevur í hesum døgum greitt frá og víst Føroya fólki, at psykiatriska deildin á Landssjúkrahúsinum er fíggjarliga so niðurundirkomin, at tað má ræða fólk. Hetta er óhugnaligt. Í roynd og veru hava ung fólk við psykiskum trupulleikum í longri tíð als ikki fingið hjálp ella viðgerð. Prátið millum ábyrgdarfólk á deildini og sjónvarpið gav okkum eina kenslu av, at øll høvdu givið skarvin yvir. Tann deprimerandi, symboliserandi myndin við tómum akslatrøðum á psykiatrisku deildini varð víst á skerminum aftur og aftur.

Í samrøðuni við landsstýrismannin við heilsumálum kom fram, at vit ikki kunnu rokna við, at stórvegis verður bøtt um hesa syndarligu støðu orsakað av peninganeyð. Hann skuldi royna at finna onkrar hissini milliónir. Eg má endurtaka: hetta er veruliga óhugnaligt! Sum eina allegori kunnu vit ímynda okkum, at bíðitíðin til eitt nú ambulanta- og ella røntgenviðgerð av politiskum orsøkum – eins og á psykiatrisku deildini – verður tvey ár ella eftir umstøðunum.

Fyrst, og áðrenn relevantir spurningar verða settir: John Johannessen, til lukku og blíðan byr og alt tað besta í tínum høga, kravmikla landsstýrismannastarvi.

Við støði í tí, sum okkara almenna sjónvarp spurdi og kanska serliga ikki spurdi landsstýrismannin, loyvi eg mær við hesum at seta landstýrismanninum fylgjandi spurningar:

– Er psykiatriska deildin, millum manna kallað Statshospitalið, sambært galdandi lóg ikki fíggjað 100% av ríkiskassanum?

– Er tað ikki satt, at 117 milliónir í ríkiskassablokkinum eru oyramerktar til:

- »Færøernes Specialskole
- Klienter under ekstern forsorg
- Aflastnings- og fritidshjemmet i Tórshavn
- Institutionsophold for færøske klienter i Danmark
- Rejser for klienter og pårørende (forsorgsydelse)
- Vikar for medarbejder med uddannelse (forsorgsydelse)
- Åndssvageforsorgen
- Anlægsudgifter, særforsorg
- Alderdoms- og plejehjem«?

– Er tað ikki satt, at landsstýrið tann 1. januar 2002 bant fyri allari dagføring av fíggingini til psykiatrisku deild galdandi í 5 ár, og at landstýrið ongantíð hevur givið ríkisstjórnini boð um at seta niðurbindingina úr gildi?

**John Johannessen, ætlar tú tær at fáa hesi óskiljandi og púra órímiligu fíggjarviðurskifti aftur í rætt lag?**

Harra landsstýrismaður John Johannessen: ætlar tú tær, her og nú, at fáa hesi óskiljandi og púra órímiligu fíggjarviðurskifti aftur í rætt lag við støði í galdandi lóggávu?

Ella: skulu tey veikastu í okkara landi – hóast lógarstøðið er í lagi – framhaldandi ikki verða vird, vard og hjálpt, tí landskassanum í ólukku mát manglar júst tann peningin, sum við sama lógarstøði er játtaður og ætlaður til psykiatriska hjálp, men innistongdur, niðurbundin?

Vónandi svarar landsstýrismaðurin mær og teimum óivað mongu spyrjandi við ella uttan psykiatriskum trupulleikum. Svar við ongari avkláring í fíggjarspurninginum, sum her er umrøddur, kann ikki loysa vandamál hjá teimum óvardu, óhjálptu og avvarðandi.



Zakarias Wang

## Møguleikin er her!

Nú er ein nýggj veljarakanning almannakunngjørd. Hon er sjálvandi eins óálítandi sum allar aðrar veljarakanningar, men eitt er vert at leggja til merkis:

Teir flokkar, sum í 1946 samtyktu, at Føroya fólk skuldi spyrjast um støðu sína til heimastýrisskipan ella loysing, og sum síðani settu ta skipan í verk, sum fólkið hevði vrakað, eru nú í minniluta.

Tað er einki serligt nýtt í hesum, tí tað hevur verið støðan nú í fleiri ár. Hetta er eitt prógv um, at tað er rætt sum teir siga í Sveis, har fólkaatkvøður eru vanligar. Ofta koma úrslitini illa við hjá tingmeirilutunum, men stjórnmálamenn har eru samdir um, at fólksins avgerðir sum frá líður vísa seg at vera rættar.

Tað er hetta, sum nú er hent í Føroyum. Føroyingar halda, at tað er skeivt av okkum ikki at seta fólkaatkvøðuna í verk.

Kann hetta fáa nakrar avleiðingar fyri tað, sum fer at henda eftir komandi val?

Sjálvandi fer tað tað.

Tað, sum tá hendur, verður eftir øllum at døma, at tann løgtingsmeiriluti, sum heldur at vit skulu lýða fólksins vilja, so sum hann vísti seg á fólkaatkvøðuni 1946, tekur seg um reiggj og sigur við teir flokkar, sum skipaðu fyri fólkaatkvøðuni, at teir eru vælkomnir upp í eina landsstýrissamgongu av øllum flokkum, sum fær hetta sjálvsagda mál avgreitt.



Sjúrður Skaale

## Kringvarpið spælir við eld

*Í gjár sendi KVF lýsarum eitt brævj sum sýnir, at tann almenni stovnurin ikki kennir sær hógv á lýsingarmarknaðinum. Tað kann raka stovnin sjálvan*

Kringvarpið skal hava loyvi til at senda lýsingar. Tað hevur týdning fyri Kringvarpið, lýsarar, lýsingarstovur - og harvið fyri búskapin allan. At bannað lýsingum í KVF hevði havt við sær, at føroyska BTÚ minkaði.

Men almenna Kringvarpið má kenna sær hógv á hesum marknaði. Tað kappast ímóti fyritøkum, sum ongum øðrum liva av enn lýsingum.

Tí tók eg tað fram á tingi, tá Kringvarpið herfyri royndi at fáa í lag samstarv við lýsingarfyritøkur, sum skuldu framleiða stuttar, bíligar lýsingar, "fyri at gera atgongdina til Kringvarpið lættari fyri teir smáu lýsararnar", sum tikið varð til.

Mítt endamál var fyrst og fremst at gera vart við, at KVF má umsita sín rætt at senda lýsingar við ábyrgd. Havast má í huga, at talan er um ein sterkan almennan stovn, sum kemur inn á ein marknað, har privatar fyritøkur hvønn dag stríðast fyri at yvirliva. Og tað er altso stórur munur á at hýsa lýsingum og so aktivt at royna at dustsúgva marknaðin.

Landsstýriskvinnan segði tá, at hon einki fer at gera fyrr enn Fjølmiðlakommissjónin kemur við sínum tilmæli í summar.

Feiri mundu kortini vóna, at bara tað at fokus kom á málið, fór at fáa KVF at steðga á og hugsa seg um.

So var ikki. Í gjár, mikudagin, fór eitt skriv undir heitinum "LøttLýsing" út til lýsarar, við lokkandi tilboðum um stuttar, bíligar lýsingar í Kringvarpinum.

### Kann skaða kringvarpið

Hóast kringvarpsgjaldið verður kravt inn á púra skeivan og órættvísan hátt, so fáa vit ikki so lítið fyri pengarnar. Alt kundi verið betri, men í KVF eru nógvar góðar sendingar, sum illa høvdu kunnað verið framleiddar á privatum grundarlag.

KVF hevur eina upplýsandi og savnandi funktión, og hon skal varðveitast og styrkjast.

Men tað er eingin sjálvfylgja at hava eitt alment Kringvarp. Og tað eru støðugt fleiri sum tala fyri at avtaka ella skerja stovnin.

**So Kringvarpið átti at kent sær hógv. Ikki minst fyri sína egnu skyld**

Tá Kringvarpið nú fer inn í kappingina um teir smáu lýsararnar, so fáa hesi eitt argument afturat. Og tað er eitt gott argument! Tí hendan atferð hjá Kringvarpinum kann raka illa sperdar privatar miðlafyritøkur meint. Og teimum hevur samfelagið sanniliga eisini brúkt fyri.

So Kringvarpið átti at kent sær hógv. Ikki minst fyri sína egnu skyld.